gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Ætla at ala laks í Hvalba

**Heri Hjelm í Vági og norsku samstarvsfelagir hansara, ætla at byggja alingina í Suðuroynni út**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*

Gongur sum ætlað verða skjótt eisini aliringar at síggja í Hvalbiarfirði.

Felagið hjá Heri Hjelm í Vági og Pan Fish Í Noregi, hava í langa tíð havt ætlanir um at byggja alivivinnuna í Suðuroynni út.

Og í tí sambandinum hava teir eisini ætlað at fara undir aling á Hvalbiarfirði.

Men nær hetta verður, er ilt at siga.

Sjálvur heldur Heri Hjelm, at tað longu hevur tikið ríkiligt av tíð at fáa øll loyvini til vega.

–Tað eru nú trý ár síðani at vit søktu um aliloyvi í Hvalba, men enn hava vit ikki fingið loyvini til vega, sigur hann.

Samstundis hava teir søkt um loyvi til at byggja smoltsøðina í Lopra út.

Hann sigur, at bæði Hvalbiarð og Sumbiar kommuna hava viðmælt umsóknini, men at tað er hjá landsmyndugleikunum, at viðgerðin strandar.

Sum tað skilst, er tað spurningurin um rættindini til tað reina vatnið, sum rennur úr Sumbiarbergholinum, sum forðar fyri eini avgerð.

Enn er tað ikki greitt, hvør eigur vatnið, sum rennur úr bergholinum. Málið er nú á veg í rættin, tí hagin hevur stevnt Landsstýrinum. Løgtingið hevur samtykt, at tað er landið, sum eigur vatnið. Men hetta heldur hagin er ólóglig ognartøka. Hagin heldur, at tað er hann, sum eigur vatnið og tí kann Løgtingið ikki uttan víðari lóggeva tað inn undir landið.

Tað skilt á landsstýrinum, at tað hevur ikki viljað tikið nakra avgerð um vatnið, fyrrenn málið er avgreitt í rættinum.

Annars eru fleiri umsóknir um at fáa loyvi til at gagnnýta vatnið til ymisk endamál.



*Hvalbiarfjørður er opin, men kortini vælegnaður til aling, heldur Heri Hjelm. Fyri trimum árum síðani søkti hann um aliloyvi á Hvalbiarfjørði, men enn hevur hann ikki fingið svar*

Heri Hjelm ásannar, at tað er stórur áhugi fyri hesum vatninum.

– Men tað skerst ikki burtur, at vit verða útihýstir frá smoltaling á vøtnunum. Tí halda vit, at vit hava framíhjá rætt at fáa annað vatn ístaðin fyri tað, sum verður tikið frá okkum.

## Ein góður fjørður

Heri Hjelm sigur, at Hvalbiarfjørður er ein góður fjørður at ala á.

Men hann er opin, so hann vigur eisini, at tað kann fara at standa nógv á, tá ið illveður er.

Heri Hjelm hevur eisini aling uttaliga í øðrum firðum og tað gongur væl.

– Royndirnar vísa, at ringarnir taka ikki so nógvan sjógv á seg. Kunsturin er at hava teir nógv stórar, so at fiskurin hevur gott pláss. Verður fiskurin ikki trokaður saman, eru ikki stórvegis trupulleikar at ala, hóast tað ikki endilgia er so kyrt.

# Ongin semja um kollfirðingar

**Semjan, sum ætlanin var at gera ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag um viðurskiftini hjá arbeiðsmonnunum í Kollafirði, er dottin á gólv fyribils**

FAKFELAGSSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

Royndirnar at finna semju ímillum Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag um viðurskiftini hjá arbeiðsmonnunum í Kollafirði, hava verið fyri bakkastið.

Og nú er óvist, nær, ella um nøkur semja verður yvirhøvur.

Stríð hevur tikiðs eg upp um limirnir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, tí eftir at Kollafjørður kom upp í Havnina, eru fleiri arbeiðarafeløg í somu kommunu við hvør sínum sáttmála og tað varð mett at kunna elva til ruðulleika, ikki mist tí at Kollafjaðrar Arbeiðarafelag er uppi í Føroya Arbeiðarafelag, men feløgini í Havnini eru uttanfyri.

Síðani hevur verið telvað aftur og fram um viðurskiftini hjá kollfirðingum.

Nakað síðani varð semja gjørd ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðarafelag øðrumegin og Havnar Arbeiðskvinnufelag hinumegin um arbeiðskvinnurnar í Kolalfirði.

Og í farnu viku tóktist tað eisini sum um at ein semja um mannfólkið var undir landi.

Tað, sum setti ferð á semingsroyndirnar, var, at ein maður úr Havnar Arbeiðsmannafelag, sum arbeiddi í Hundsarabotni, var fluttur í annað arbeiði, tí hann var ikki limur í Kollafjarðar Arbeiðarafelag.



*Ingeborg Vinther sigur, at okkurt hevur stungið seg upp, sum hevur forðað fyri eini semju*

Havnar Arbeiðsmannafelag hótti við tiltøkum, um viðurskiftini ikki komu í rættlag og tað setti ferð á arbeiðið at finna eina semju.

Hendan semjan segði, at arbeiðsmenn í Kollafirði skuldu hava frítt at arbeiða í Tórshavn, uttan at vera noyddir at melda seg inn í Havnar Arbeiðsmannafelag. Afturfyri skuldu limir í Havnar Arbeiðsmannafelag hava frítt at arbeiða í økinum hjá Kollafjarðar Arbeiðarafelag, uttan at melda seg inn í tað.

Tað skiltist sum um semjan var klár at skriva undir.

Men enn er ongin semja fingin um viðurskiftini.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, ásannar, at okkurt er komið upp ímillum, sum hevur forðað fyri, at semja kann gerast.

Men hon vil ikki útgreina, hvat tað er, sum hevur stungið seg upp.

Karl Johansen. formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur í stuttari viðmerking, at semjan er dottin á gólv, tí at Føroya Arbeiðarafelag krevur, at hon skal vera galdandi fyri allar limir í Føroya Arbeiðarafelag, so at teir hava frítt at fara inni á -kin um hjá Havnar Arbeiðsmannafelag

# Tað fer ikki ein dropi á Vágsfjørð

**Laksavirkið, sum letur upp í Vági um tríggjar vikur, er so framkomið, at tað hevur vakt ans uttanfyri landoddarnar**

UMHVØRVISVERND
*Áki Bertholdsen*

Tá ið laksavirkið, sum letur upp í virkisbygninginum hjá gamla Polarfrost í Vági, letur upp um tríggjar vikur, verður tað samstundis eitt virki, sum hevur vakt ans uttanfyri landoddarnar.

Seliga er tað skipanin, sum virkið brúkar fyri at sleppa undan dálkingini, sum hevur hugtikið bæði fólk í vinnuni, og granskarar.

Talan er um virkið, sum felagið hjá Hera Hjelm í Vági og norska felagnum, Pan Fish, letur upp í Vági um tríggjar vikur. Talan er um eina íløgu uppá 60-70 milliónir krónur og ikki 50-60 milliónir, sum vit søgdu í leygardagsblaðnum. Eini 100 fólk fara at arbeiða á virkinum.

– Suðuroyggin er bilvin eitt stórt aliøkið og royndirnar higartil vísa, at dálkingin er lítil og ongin frá alingini, sigur Heri Hjelm.

Hann heldur eisini, at treytað av, at tamarhaldið á dálkingini verður varðveitt, er tað ein fyrimunur, at Suðuroyggin liggur so langt frá aðrari aling í Føroyum, tí so er tað sjálvsagt ikki so lætt at fáa smittandi sjúkur, sum tað hevði verið, um alingin lá tættari uppat aðrari aling í Føroyum.

Og hann sigur, at nú nýtt laksavirkið skal gerast í Vági, er tað ætlanin at gera tað, sum gerast kann fyri at sleppa undan dálking.

Heri Hjelm sigur, at tað fer ikki ein dropi at fara á sjógv í Vágsfirði frá virkinum, hvørki framleiðsluvatn ella annað frárensluvatn, td. blóðvatn.

Hann sigur, at ætlanin er at gagnnýta innvølir og slógv við at vinna lýsi burturúr tí. Tey turrevni, sum so verða eftir, verða fryst og seld sum djórafóður.



*Laksavirkið, sum nú verður gjørt í gamla Polarfrost í Vági, er ógvuliga framkomið og tað fer ikki ein dropi, hvørki av blóðvatnið ella framleiðsluvatni á Vágsfjørð*

Framleiðsluvatnið t.d. blóðvatn, verður veitt í skiftitangar, har bakteriudrepandi evni verða sett til. Tá ið bakteriurnar eru dripnar, verður vatnið pumpa í Vesturhavið við kloakskipanini hjá kommununi. Har er brimpláss og streymasjógvur og tað liggur langt frá allari aðrari aling í Føroyum.

– Við at pumpa vatnið út á opið hav, er sera lítið sannlíki fyri at tær bakteriur, sum skuldi verið eftir, fara at vera nakar sum heldt vandi fyri alingina, sigur Heri Hjelm.

–Hetta verður at kalla sama skipan, sum vit høvdu á Vatnsnesi, tí tað er einasta smoltstøð, har onki rennur út í nakað aliøki.

Hann sigur, at hendan loysnin at avmarka dálkingina hevur vakt ans uttanlands.

– Eini ráðstevnu, sum varð her í summar, sóu útlendskir granskarar tekningar av ætlanini og teir hildu hetta verða eina so góða skipan, at teir fóru at kalla hetta fyri »Vágsloysnina«.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 129 • týsdagur • 10. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Í mikudagsblaðnum verður stór frásøgn frá kappróðrinum á Sundalagsstevnuni**

# Føroyski bólturin blásti alt undan sær

**Oyggjaleikir: Bæði í fótbólti og flogbólti hefti einki fyri føroysku liðunum. Í renning stóðu Heini Hátún og Magni Mouritsen seg væl sunnudagin, meðan marginalirnir ikki vóru við í fleiri øðrum ítróttargreinum**



*Ellivu ferðir fagnaðu føroysku fótbóltskvinnurnar hvørjari aðrari á Isle of Man, og rómurin var eins stórur hvørja ferð*

Føroyingar eru knáir í fótbólti og flogbólti. Tað varð enn eina ferð staðfest á fyrsta degnum á oyggjaleikunum suðuri á Man. Eingin mótstøða hefti fyri kvinnulandsliðnum í flogbólti, sum vann 3–0 á Cayman Island, og menninir vunnu 3–1 á Cayman Island og 3–0 á Orkneyoyggjunum.

Í fótbóltinum gjørdi kvinnurnar so nógv um seg, at tað mest av øllum var átókt avrikinum hjá manslandsliðnum í fótbólti, tá oyggjaleikirnir vóru í Føroyum fyri tólv árum síðani.

Føroyar vunnu 11–0 á vertstjóðini, og høvdu tær tímað framvegis at spílað seg út í 2. hálvleiki, so var sigurin vorðin uppaftur størri. Edward prinsur og konan vóru á stadion eina løtu. Undan dystinum heilsaðu tey uppá allar spælararnar. Føroysku kvinnurnar høvdu undan fráferðini úr Føroyum vant seg í at níga soleiðis, sum tað sigst, at tað eigur at verða gjørt, tá hondin skal rættast kongaligum, og tað gekk væl betri hjá føroysku kvinnunum, enn tað gjørdi, tá Mr. Bean á sinni heilsaði upp á drotningina!

Prinsaparið var á stadion í eitt korter. Tá tey fóru av vøllinum var tað við vissuni um, at teirra undirsáttar fóru at tapa ímóti Føroyum, sum longu tá vóru frammanfyri við trimum málum.

Stóri málslúkurin sunnudagin var Rannvá Andreasen. Hon hevur framúr dygdir sum álopsspælari. Sum allir hinir liðfelagarnir hevur hon góðan bóltførleika og gott taktiskt skil, hon er skjót og sterk, og hon sparkar sum ein hestur. Hesa ferð eydnaðist henni at skora fimm mál. Tað er næstan føroyskt met í einum oyggjaleikadysti. Metið eigur Bergur Magnussen, sum í 7–1 sigrinum ímóti Álandi í 1989 skoraði seks mál.

Vøllurin, sum føroyska kvinnulandsliðið spældi á sunnudagin, var einki at reypa av. Men tær roknaðu við, at talan fór at vera um betri vallir í komandi dystunum. Í gjárkvøldið skuldi føroyska liðið spæla ímóti Ynis Mon. Tær vórðu mettar at vera á umleið sama støði sum Isle of Man. Upprunaliga var Cayman Island fjórða liði í bólkinum, sum Føroyar eru í, men stutt undan leikunum góvu tær avboð.

Í hinum bólkinum vann Jersey sunnudagin 4–0 á Isle of Wight, og Áland vann 9–1 á Guernsey. Hálvfinalurnar verða spældar hósdagin.

Í flogbólti hjá monnunum verður roknað við, at avgerandi dysturin um fyrsta plássið í bólkinum verður í morgin, tá Føroyar skulu spæla ímóti Sarema.

## Marginalirnir fleiri ferðir ímóti

Í liðkappingini í borðtennis gekst ikki væl sunnudagin.

Í badminton gekk heldur ikki væl. Føroyingar vunnu ein dyst og taptu ein. Tey høvdu roknað við, at úrslitið fór at verða nóg mikið at koma víðari í kappingini við, men soleiðis gekst tað kortini ikki.

Í trialton vísti tað seg, at føroyingarnir, sum luttóku fyri fyrstu ferð, als ikki vóru á sama støði sum bestu tjóðirnar. Í hálvum maraton fyri lið vóru bronsumerkini í eygsjón, men Hallur Holm og Guttormur Sørensen vóru akkurát ov stuttir og endaðu á fjórða plássinum.

Ingibjørg Poulsen megnaði ikki at verja bronsumerkið í kúluvarpi frá seinastu leikunum. Besta kastið hjá henni var umleið eins gott og tað var ta ferðina, men kappingarneytarnir høvdu ment seg so mikið, at Ingibjørg endaði á fjórða plássi

Heini Hátún megnaði at renna seg í semifinaluna á tvey hundrað metrum. Semifinalan skuldi vera tíðliga í gjárkvøldið. Tíðin hjá Heina í innleiðandi umfarinum var so mikið góð, at tað varð mett, at finaluplássið var í eygsjón. Magni Mouritsen rann seg sunnudagin í finaluna á 800 metrum. Hon skuldi eisini vera í gjárkvøldið.

Fyrsta kappingardagin vóru ongar kappingar í bogaskjóting og svimjing. Hetta eru ítróttargreinar, har føroyingar á undanfarnu leikunum hava vunnið nógv heiðursmerkir.

Okkara menn á Isle of Man, Álvur Haraldsen og Jákup Mørk, hava ikki ligið á løtu síðuni. Tað, sum teir fingu burturúr fyrsta kappingardegnum, ber til at lesa á síðunum 18–25, og harafturat er frásøgn frá 10. umfarinum í landskappingini í 1. deild í fótbólti, har GÍ vann fyri 10. ferð. Superveteranar í B71 fóru við øllum stigunum av Mølini á Eiði, har pallurin var so náttúruvakur, sum tað neyvan sæst nakra aðra staðni í heiminum, har tað verður kappast í fremstu røð í FIFA høpi.

**jh**